Dagf. 30. september 2025
HMR j. nr. 25/25210-4

Súsanna Bertholdsen
landsstýriskvinna

Svar

upp á

Fyrispurning nr. 52-022/2025 eftir § 52a í tingskipanini, um sjúkraviðgerð uttanlands, frá Erling Eidesgaard, løgtingsmanni.

Spurningarnir vóru soljóðandi:

1. Hvørjar upphæddir keypa vit árliga sjúkraviðgerð fyri uttanlands skift á lond aftur til 1976 ella so langt aftur, sum tøl eru tøk?
2. Hvørjar upphæddir brúka vit uppá ferðing og gisting í sambandi við sjúkraviðgerð uttanlands skift á lond aftur til 1976 ella so langt aftur, sum tøl eru tøk?
3. Hví sendir føroyska sjúkrahúsverkið krabbameinssjúklingar til Danmarkar í viðgerð, tá hagtøl støðugt vísa, at yvirlivilsisratan í eitt nú Svøríki er munandi hægri?
4. Hvat hevði eykakostnaðurin (ella sparingin) verið, um krabbameinssjúklingar í staðin fyri á Ríkissjúkrahúsið vórðu sendir til Skånes Universitetssjukhus**?**

Svar:

Til spurning 1
Upphæddirnar í talvuni niðanfyri eru tiknar úr Búskaparskipan Landsins (BSL). Tað verða ikki skrásett lond í skipanini, men í svarinum hevur Sjúkrahúsverkið mett, hvat land, veitarin hoyrir til. Dátur finnast ikki aftur til 1976 í BSL, men aftur til 1997. Fyrivarni má takast fyri, at skrásetingarháttur og játtanarháttur kann vera broyttur við árunum. Tí skal fyrivarni, sambært Sjúkrahúsverkinum, takast fyri tølunum frá 1997 fram til 2017.

Tølini eru frá stovnsnummar 121720 Serviðgerð uttanlands – og útreiðslur beinleiðis til viðgerðarstovnar eru tiknar við.

Talvan niðanfyri er býtt á Danmark, Ísland, Noreg, Svøríki, Týskland, Bretland, Sveits og “Onnur lond”. Sjúkrahúsverkið hevur valt at bólka “Onnur lond”, tí at tølini gerast so smá, at tað kann gerast ov lætt at eyðmerkja, hvørjar sjúklingar talan er um.

Talva 1. Útreiðslur til sjúkraviðgerð uttanlands, býtt á lond

1.000 kr.	Danmark	Ísland	Noreg	Svøríki	Týskland	Bretland	Sveits	Onnur lond	Tilsamans
1997	37.366	277	0	0	0	0	0	0	37.644
1998	36.164	0	0	0	0	0	0	0	36.164
1999	36.283	0	0	0	0	913	0	0	37.195
2000	47.514	0	0	0	609	0	0	0	48.123
2001	47.985	0	0	16	0	0	0	0	48.001
2002	58.812	224	0	0	53	3	3	0	59.094
2003	60.705	482	0	432	25	1	0	0	61.645
2004	66.132	533	0	98	365	3	0	0	67.132
2005	66.720	244	0	233	17	3	0	705	67.922
2006	72.713	88	249	47	17	0	0	0	73.115
2007	85.126	132	851	0	18	0	0	0	86.125
2008	95.126	452	1.774	124	70	0	0	371	97.917
2009	93.844	576	2.695	0	14	0	6	142	97.276
2010	86.859	1.300	135	328	4	0	0	0	88.625
2011	98.149	2.044	171	514	3	0	0	0	100.881
2012	97.785	3.283	0	300	0	99	0	0	101.466
2013	109.168	3.821	0	467	0	0	8	0	113.464
2014	106.138	5.504	0	172	2	0	238	0	112.054
2015	102.106	3.554	0	24	0	0	0	0	105.684
2016	98.323	5.396	0	366	0	0	1.380	0	105.466
2017	123.213	6.123	0	247	0	31	0	16	129.630
2018	126.359	4.668	0	943	0	0	0	7	131.977
2019	116.948	2.046	4	52	20	0	0	0	119.070
2020	117.898	577	0	0	0	0	0	0	118.476
2021	143.690	317	0	0	0	0	0	0	144.007
2022	153.634	373	0	0	0	0	24	0	154.030
2023	143.035	212	88	0	0	5	24	0	143.364
2024	148.599	280	0	0	86	1.090	0	0	150.055
Tilsamans	2.576.393	42.507	5.967	4.363	1.303	2.147	1.681	1.241	2.635.602

Til spurning 2

Sambært Sjúkrahúsverkinum verða útreiðslur til ferðing og gisting ikki greinaðar á lond, tí ber ikki til at upplýsa hetta. Niðanfyri er talva, ið vísir býtið millum ferðing og gisting yvir ár, eins og hvat útreiðslurnar til sjúklingahotellið Tórshavn hava verið um árið. Á sama hátt sum í spurningi 1 ber ikki til at fáa data aftur til 1976, men Sjúkrahúsverkið metir at tølini tey seinastu 10 árini eru álítandi. Sí talvu niðanfyri.

Talva 2. Útreiðslur til ferðing og uppihald

	2014	2015	2016	2017	2018	2019	2020	2021	2022	2023	2024
Tíma- og dagpeningur	278	273	349	329	396	369	312	417	297	345	300
Náttarviðbøtur	6	6	11	8	17	15	10	15	12	6	4
Vistarhald	975	1.166	1.686	2.198	2.659	1.459	1.437	1.316	1.478	2.013	1.741
Akfør	1.504	2.148	2.435	2.550	2.718	2.687	2.249	1.869	1.367	1.732	1.856
Loftvegis	18.912	18.295	20.704	18.733	17.988	18.619	16.372	20.509	18.374	22.599	21.027
Sjóvegis	134	143	150	100	76	92	154	172	227	158	78
Sjúklingahotellið Tórshavn	17.388	17.839	18.346	19.082	20.383	20.545	21.355	22.809	24.131	25.656	26.307
	39.197	39.870	43.681	43.000	44.237	43.786	41.889	47.107	45.886	52.509	51.313

Til spurning 3

At yvirlivilsisratan er hægri summastaðni enn aðrastaðni, er ikki einans treytað av sjálvari viðgerðini, sum viðkomandi fær á sjúkrahúsi. Onnur viðurskifti eru eitt nú, lívsháttur (t.d. royking, alkohol, kostur og rørsla). Eisini hevur tað týdning, hvussu skjótt sjúklingurin ger vart við seg, hvussu skjótt hesin verður útgreinaður, og hvussu skjótt sjúklingurin kemur í viðgerð.

At sjúklingar verða sendir til Danmarkar hongur millum annað saman við, at okkara viðgerðir hanga tætt saman við tær skipanir, viðgerðarætlanir (protokollir) v.m., sum verða brúktar í Danmark. Í Føroyum brúkar Sjúkrahúsverkið til dømis somu krabbameinsviðgerðarætlanir sum í Danmark. Løggildingar hjá heilsustarvsfólkunum eru eisini danskar og leiðreglur í heilsuverkinum fylgja í stóran mun donskum leiðreglum.

Logistiskt eru fleiri fyrimunir at senda sjúklingar til Keypmannahavnar. Vit hava sera gott ferðasamband til Keypmannahavnar, og stutt er á sjúklingahotell og sjúkrahús. Vit hava eitt sjúklingahotell í Keypmannahavn, har flestu sjúklingarnir búgva, tá teir skulu í viðgerð, og gott ferðasamband er millum sjúklingahotellið og sjúkrahúsini í Keypmannahavn.

At senda sjúklingar til Danmarkar merkir eisini, at nógvir av sjúklingunum eru í kendum umhvørvi, fleiri teirra hava skyldfólk, vinfólk og kenningar í Danmark, og hetta kann ofta verða ein góð hjálp í einari annars torførari støðu.

Alt hetta spælir sín leiklut í, at flestu føroysku sjúklingarnir, ið hava tørv á serviðgerð uttanlands, verða sendir til viðgerð í Danmark.

Til spurning 4

Sambært Sjúkrahúsverkinum er ilt at siga, hvat eyka kostnaðurin (ella sparingin) hevði verið, um krabbameinssjúklingar vórðu sendir til Skånes Universitetssjúkrahús heldur enn Ríkissjúkrahúsið. Tá ið Sjúkrahúsverkið vanliga samanber við sjúkrahús í Danmark, brúka tey ein sonevndan DRG takst (ein standard kostnaður fyri viðgerðir), sum tey hava atgongd til. Í Svøríki brúka tey ikki hendan takstin og Sjúkrahúsverkið kennir ikki til nakran líknandi takst ella skipan, sum tey kunnu fáa atgongd til.

Regiónirnar í Danmark geva avsláttur, sum ger at Sjúkrahúsverkið kann fáa betri prísir, men tað er ikki givið, at tað sama hevði verið galdandi í Svøríki.

Sambært Sjúkrahúsverkinum er ómøguligt at fáa eina nágreiniliga kostnaðarmeting fyri Skånes Universitetssjukhus uttan so, at Sjúkrahúsverkið biður um eitt ítøkiligt viðgerðartilboð, sum tey ynskja at fara víðari við.

Heilsumálaráðið, 30. september 2025

Súsanna Bertholdsen
landsstýriskvinna